# LEIKSKRÁ

12. UMFAR

12. JULI 2020

BLAÐ NR. 08




MYND: SVERRI EGHOLM

SKÁLA 1965

HAVSBRÚN

betri DEILDIN

## VÆLKOMIN TIL DYST Í FLØTUGERÐI

# Innihald

Dysturin í dag ........ 4
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá monnum ........ 8
Liðuppsetingin hjá ÍF og Skála ........ 10
Leikarin hesaferð ........ 14
Hagtøl fyri Betri-deildina hjá kvinnum ........ 18
Seinasti dysturin ........ 22
ÍF-sangurin ........ 24

**ÍF**, Ítróttarfelag Fuglafjarðar, 530 Fuglafjørður, tel. 228771, if@if.fo, www.if.fo.
**Útgevari:** ÍF-fótbóltur. **Ábyrgd:** ÍF-fótbóltur. **Uppsetan:** Maibritt P. Bærentsen.

MAGN KAFFI
NÝMALIÐ • VISTFRØÐILIGT



HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fi



**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ

# Dysturin í dag

Landskappingarárið 2020 byrjaði við einum útidysti ímóti Skála. Hendan dystin, sum bleiv leiktur 9.mai, vann ÍF 2-1 og fekk harvið eina sera góða byrjan uppá ársins Betri-deild. Í tí dystinum skoraði Uros bæði málini fyri ÍF.

Nú standa okkara dreingir so aftur yvirfyri Skála, og nú er tað á heimavølli í Fløtugerði, at slagið skal standa. Kravið er heilt sikkurt ein heimasigur til ÍF, tí higartil hevur kappingin laga seg soleiðis, at ÍF liggur á einum 6. plássi við 16 stigum, og Skála liggur á einum 10.plássi við bert 1 stigi. Man kann siga, at felagið av vestara armi á Skálafjørðinum hevur fingið eina byrjan uppá kappingarárið 2020 sum líkjist tí byrjan, sum ÍF fekk í 2019.

Tað kiksaði at fáa stig á heimavølli ímóti HB í síðsta umfari, men í dag burdi mótstøðan verið nakað minni, so at tað eru líkindir fyri 3 stigum til ÍF í dag. So koma vit upp á 19 stig og kunnu leggja enn meira frástøðu til absolutta botnin, sum telur Skála, AB, TB og Skála.

Tað kann hugsast, at ÍF hevur eitt syndrom sum ger, at leikararnir ikki ordiliga trúgva uppá, at tað ber til at at hugsa upp eftir stigatalvuni. Um so er, so leikararnir at hyggja uppum hetta fyribrigdi og trúgva uppá egin evnir.

Mangan hevur tað verið trupult í dystum, tá ið ÍF og Skála hava møtst. Bæði tá ið liðini hava verið í Betri-deildini, og eisini tá ið liðini hava spælt í 1.deild. Soleiðis skal tað ikki verða í dag, tí okkara leikarar eru nóhb betri enn Skála-leikararnir.

Tað varð í fyrradagin, at nýggja felagshúsið hjá ÍF bleiv handað alment, og tað er eitt sera spennandi framstig fyri felagið, leikarar, onnur og allar fuglfirðingar, at hetta húsið kemur. Umstøðurnar gerast so nógv betri við einum tílíkum húsi. Spennandi verður at fylgja við í víðari, tá ið húsið verður gjørt liðugt á ovaru hæddunum og harvið gerst ein týðandi partur av felagslívinum og ítróttarlívinum í kommununi.

**Góðan dyst øll somul.**














SPEKT
løggildir
grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG samskip






Vit umboða hesi merki

Cummins – Bátamotorar
3M PELTOR – Oyravernd
EXIDE BATTERIES – Akkumulatorar
Fronius – Sveisiútgerð, elektrodir, gass
Mobil – Smyrjiolja
Dräger – Filtur, maskur og gassmátarar
CREWSAVER – Solas góðkendir bjargingarvestar og draktir
DSB RFD – Bjargingarbátar
MULLION – Flóti og yvirlivilsisdraktir

- Oljuklútar
- CO2 og onnur køligass
- Sløkkiútgerð og tænasta

Fønix

Mykinesgøta 8 • Boks 18 • FO-110 Tórshavn • Tel 31 19 09

11. UMFAR

# HAGTØL

## í Betri-deildini hjá monnum

KELDA: FAROESOCCER

### HETTA UMFARIÐ

| |
|---|
| ÍF - Skála |
| Víkingur - AB |
| EB/Streymur - HB |
| TB - NSÍ |
| B36 - KÍ |

### 13. UMFAR

| |
|---|
| AB - ÍF |
| NSÍ - KÍ |
| Skála - EB/Streymur |
| HB - TB |
| B36 - Víkingur |

### Betri-deildin Menn

betri DEILDIN

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 11 | 9 | 1 | 1 | 28 | 10 | 18 | 28 |
| 2 | NSÍ | 11 | 8 | 2 | 1 | 26 | 6 | 20 | 26 |
| 3 | KÍ | 11 | 8 | 2 | 1 | 30 | 11 | 19 | 26 |
| 4 | B36 | 11 | 8 | 1 | 2 | 33 | 13 | 20 | 25 |
| 5 | Víkingur | 11 | 5 | 2 | 4 | 19 | 15 | 4 | 17 |
| 6 | ÍF | 11 | 5 | 1 | 5 | 14 | 22 | -8 | 16 |
| 7 | EB/Streymur | 11 | 2 | 1 | 8 | 6 | 20 | -14 | 7 |
| 8 | TB | 11 | 1 | 3 | 7 | 7 | 15 | -8 | 6 |
| 9 | AB | 11 | 0 | 4 | 7 | 7 | 31 | -24 | 4 |
| 10 | Skála | 11 | 0 | 1 | 10 | 7 | 34 | -27 | 1 |

TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 8 |
| 2 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 8 |
| 3 | Klæmint A. **Olsen** (NSÍ) | 7 |
| 4 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 7 |
| 5 | Uros **Stojanov** (ÍF) | 7 |
| 6 | Adrian **Justinussen** (HB) | 6 |
| 7 | Michal **Przybylski** (B36) | 6 |
| 8 | René S. **Joensen** (HB) | 6 |
| 9 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 5 |
| 10 | Sebastian **Pingel** (B36) | 5 |

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Jann **Benjaminsen** (NSÍ) | 7 |
| 2 | Philip **Djordjevic** (ÍF) | 6 |
| 3 | Jóannes **Bjartalíð** (KÍ) | 6 |
| 4 | Daniel **Johansen** (HB) | 5 |
| 5 | Meinhard E. **Olsen** (B36) | 5 |
| 6 | Petur **Knudsen** (NSÍ) | 5 |
| 7 | Sølvi **Vatnhamar** Víkingur) | 5 |
| 8 | Árni **Frederiksberg** (B36) | 4 |
| 9 | Sebastian **Pingel** (B36) | 4 |
| 10 | Stefan **Radosavljevic** (B36) | 4 |

# 12. UMFAR

betri DEILDIN

## ÍF

| Leikari | Nr. |
|---|---|
| Tóri T. **Traðará (M)** | 1 |
| Jan Ó. **Ellingsgaard (L)** | 3 |
| Jens **Joensen** | 4 |
| Karl **Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Uros **Stojanov** | 8 |
| Filip **Djordjevic** | 9 |
| Ari Ó. **Ellingsgaard** | 10 |
| Hákun **Edmundsson** | 11 |
| Hans Jákup **Lervig** | 12 |
| Jákup **N. Olsen (M)** | 13 |
| Gundur E. **Petersen** | 14 |
| Bogi A. **Løkin** | 15 |
| Sámal **Joensen** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 18 |
| Rói **Róin** | 19 |
| Jóhan **Petersen** | 20 |
| Tóri **N. Olsen** | 21 |
| Sjúrður Pauli **Nielsen** | 22 |
| Andy Ó. **Olsen** | 23 |
| Milos **Budakovic (M)** | 25 |
| Ólavur **Larsen** | VENJARI |
| Hans Jørgen **Djurhuus** | VENJARI |
| Pauli **Jarnskor** | MÁLMANSVENJ. |
| Milan **Svojic** | HJÁLPARVENJ. |

**LIÐLEIÐARAR:** TRÚGVI NESÁ, ÓLAVUR ELLINGSGAARD, POUL N. MIKKELSEN OG PALLI VANG

**FYSIO:** HANUS ELIASEN, ÁLVUR HANSEN OG JÓNFRÍÐ HANSEN

## SKÁLA

| Nr. | Leikari |
|---|---|
| 1 | Bárður **á Reynatrøð (M)** |
| 2 | Rói **Olsen** |
| 3 | Teitur R. **Joensen** |
| 4 | Karl Martin **Johansen** |
| 5 | Hjalti **Strømsten** |
| 6 | Pætur D. **Jacobsen (L)** |
| 7 | Kristian Martin **Jakobsen** |
| 8 | Jóhan W. **Høgnesen** |
| 9 | Aksel B. **Danielsen** |
| 10 | Ronni **Møller-Iversen** |
| 11 | Poul **Kallsberg** |
| 12 | Kristin N. **Vilhelmsen (M)** |
| 13 | Mikal **á Reynatrøð** |
| 14 | Aksel **Jacobsen** |
| 15 | Hanus **Mikkelsen** |
| 16 | Jákup **Joensen** |
| 17 | Niels Pauli B. **Danielsen** |
| 18 | Jan I. **Hansen** |
| 19 | Andreas E. **Jacobsen** |
| 21 | Heðin **Klakstein** |
| 22 | Djóni J. **Petersen** |
| 23 | Dávid **Johansen** |
| 24 | Lukas **Sólheim** |
| 25 | Jóhan **Johansen** |
| 26 | Teitur **Poulsen** |
| | Suni **Ernstsson (M)** |
| VENJARI | Bill M. **Jacobsen** |
| HJÁLPARVENJ. | Pætur D. **Jacobsen** |

| | | |
|---|---|---|
| DÓMARI | Kári J. **á Høvdanum** | |
| HJÁLPARDÓMARAR | 1. Arni **Rasmussen** | 2. Jan **Andersen** |
| 4. DÓMARI | Áron Sofus **Vest** | |
| EYGLEIÐARI | Jens **Midjord** | |

**BÓLTSTUÐUL:** EN-TEK







sendistovan
Sjóbusiness
Góð sambond síðan 1919
FAROE SHIP


Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60


teknistovan GØTA
Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
Henning Olsen
Far.: ho 232344
FO 510 Gøta tel. 442344 teknistovan@teknistovan.fo www.teknistovan.fo


sansir.fo
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
BANKNORDIK
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

13

LEIKARIN

# JÁKUP N. OLSEN

**TEKST OG MYND:** ATLI PETERSEN

## TÚ:

**Navn:** Jákup Nolsøe Olsen.
**Føðingardagur:** 03.01.1999.
**Føðistað:** Tórshavn.
**Starv:** Skrellimaður í løtuni.
**Pláss á vøllinum:** Málverji.
**Yvirtrúgv:** Upp kl. 9 og hava sovið 9 tímar tá tað er dystardagur og eta kylling 3 tímar áðrenn dystarbyrjan.
**3 orð sum lýsa teg:** Tvørur, positivur og illsintur.
**Torførasti mótstøðumaður:** Óli Jóhannesen.
**Frítíðarítriv:** Slappa av og hyggja seriu.
**Vónir fyri 2020:** Enda í ovaru hálvu, og vinna steypakappingina.

## TÍN ÍTRÓTT:

**Fyrsti dystur á 1.liðið:** 20.10.2019 móti Skála.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var 4-5 ár sikkurt?
**Aðrar ítróttargreinar:** Badminton.
**Minningarríkasti dystur:** Skála í fjør, og B36 í ár.
**Størstu fótbóltsliga ávirkan:** Jákup Mikkelsen.
**Besti fótbóltsleikari:** Nenad Saric.
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Hondbólt ella badminton.

**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Intervall ella aðrar intensar venjingar.
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** Taktiska venjing.

## TÍNIR FAVORITTAR:

**Matur og drekka:** Grindatvøst, spik og eplir og íste.
**Slag av tónleiki:** Pop.
**Sjónvarpssending:** Californiacation.
**At slappa av:** Við damuni.

## TROYGGJA NR.: 13

**Besti fótbóltsleikari nakrantíð:** Jerzy Dudek og Steven Gerrard.
**Sjónvarp/filmstjørna:** David Duchovny.
**Besta bók/blað:** Einki sum kann lesast er gott.
**Stuttligasti persónur:** Andreas Reinert Zachhau.
**Stuttligasti í hópinum:** Ari og Jens.

**Besti ÍF áskoðari:** Jastrid á Dalbø.




## FAKTA UM TÓRA

Hevur nógv fótbóltsblóð í sær. M.a. er sonur Jón N. Olsen, sum var við í 79 liðinum og er eisini beiggi okkara Tóra.

Er uppvaksin á Kambsdali og tískil hevur nokk lært 1-2 ting frá Jan, Ara og Sámal, sum eisini eru uppvaksir á Kambsdali

9. mars var Jákup sera bersøgin á Facebook og setti spurning við hví skúlin á Kambsdali skulu avlýsa eina kvøldsetu, meðan skúlin koyrdi full speed og endaði við „Her er meira at binda um hálvan fingur“.


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
WWW.JANUAR.FO


Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald
Bilverkstaðið á Kambsdali
Tlf. 441111


A Member of The Linde Group
AGA-FØROYAR
AGA - Føroyar/www.AGA.fo/Akranesgøta 2/FO-100 Tórshavn/Tlf + 298 - 315544/AGA@AGA.fo

KELDA: FAROESOCCER

8. UMFAR

## Betri-deildin Kvinnur

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 8 | 8 | 0 | 0 | 18 | 7 | 11 | 24 |
| 2 | NSÍ | 8 | 3 | 3 | 2 | 16 | 8 | 8 | 12 |
| 3 | B36 | 8 | 2 | 4 | 2 | 12 | 10 | 2 | 10 |
| 4 | ÍVB | 8 | 2 | 3 | 3 | 11 | 13 | -2 | 9 |
| 5 | HB | 8 | 1 | 3 | 4 | 10 | 13 | -3 | 6 |
| 6 | EBS/Skála | 8 | 1 | 1 | 6 | 6 | 22 | -16 | 4 |

**HETTA UMFAR**
12. juli 2020

| |
|---|
| **NSÍ - ÍVB** |
| KÍ - B36 |
| HB - EBS/Skála |

**KOMANDI UMFAR**
26. juli 2020

| |
|---|
| **ÍVB - HB** |
| EBS/Skála - KÍ |
| B36 - NSÍ |

TOPP 10

### MÁLSKJÚTTAR í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Heidi **Sevdal (NSÍ)** | 6 |
| 2 | Jacoba **Langgaard (ÍVB)** | 5 |
| 3 | Evy **á Lakjuni (KÍ)** | 4 |
| 4 | Eyðvør **Klakstein (KÍ)** | 4 |
| 5 | Olga Kristina **Hansen (B36)** | 4 |
| 6 | Rannvá **Andreasen (KÍ)** | 4 |
| 7 | Bára **Magnussen (B36)** | 3 |
| 8 | Emma **Hansdóttir (B36)** | 2 |
| 9 | Julia Naomi **Mortensen (HB)** | 2 |
| 10 | Kára **Djurhuus (HB)** | 2 |

TOPP 10

### UPPLEGG í Betri-deildini

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Evy **á Lakjuni (KÍ)** | 6 |
| 2 | Heidi **Sevdal (NSÍ)** | 4 |
| 3 | Julia Naomi **Mortensen (HB)** | 4 |
| 4 | Durita **Hummeland (KÍ)** | 3 |
| 5 | Jensa **Tórolvsdóttir (ÍVB)** | 3 |
| 6 | Sanna **Svarvadal (KÍ)** | 3 |
| 7 | Sara **Lamhauge (HB)** | 3 |
| 8 | Elmi **Isaksen (HB)** | 2 |
| 9 | Emma **Hansdóttir (B36)** | 2 |
| 10 | Íðunn **Egilstoft (EBS/Skála)** | 2 |



Bilasølan
Vegurin Langi 43 | 188-Hoyvík | 359700 | bilasolan.fo
.com/bilasolan .com/bilasolan



# Leiðandi reiðarí
# í norðurhøvum




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

Vit takka
fyri stuðulin

multiputl

Vit sveisa vinyl, gera HVS arbeiði
og putlast við alt møguligt annað …

tel. +298 207575 | multiputl@multiputl.fo







11. UMFAR

**TEKST:** EIVIN BREIÐASKARÐ.
**MYND:** PALLI VANG

# ÍF-HB

**Aftaná eina góða gongd higartil í landskappingini 2020, vórðu stórar væntanir til ÍF-liðið, sum hevði heimavøll ímóti stórfelagnum og oddaliðnum í ársins Betri-deild, HB, tá ið liðini brustu saman í Fløtugerði leygardagin 4.juli.**






Dysturin byrjaði við einum braki, tí longu eftir 5 minuttir legði heimaliðið seg á odda. Ein langur bóltur bleiv spældur upp á Uros í ÍF-álopinum, og hann forlongdi sendingina víðari við høvdinum til Hans Jákup, sum kom inn um HB-verjuna, áðrenn hann knallaði bóltin í kassan. Rómurin á ÍF-fjepparunum varð sera stórur tá, tí nú tevjaðu teir eitt gott úrslit.

Tað gingu 25 minuttir inntil HB javnaði til 1-1. Eitt gott innlegg kom úr vinstru síðu og Mathias Nygaard skallaði bóltin í netið við nærmastu stong.

Tað vóru stórur møguleikar báðar vegir í fyrra hálvleiki, men sjálvt um HB kanska hevði bóltin meira, so varð tað ÍF og serliga Hans Jákup, sum høvdu teir størstu. Hans Jákup hevði faktiskt 2 sera stórar kjansur áðrenn hálvleikssteðgin, og minst annar av teimum átti at givið mál.

Annar hálvleikur byrjaði eitt sindur rótutur, og sum í fyrra hálvleiki, so varð tað útiliðið HB sum hevði bóltin meira enn heimaliðið. Tó varð ÍF aftur væl við og hevði onkrar brúkbarar møguleikar.

Aftaná 66.min legði HB seg á odda í dystinum. Tá varð tað landsliðsleikarin René Shaki Joensen, sum slapp innum aftastu verjuleikararnar hjá ÍF og legði bóltin eftir jørð í ÍF-málið. 2-1 til HB og oddaliðið kláraði enn aftur at hála ein tepran sigur í hús. Tað er so líkt einum meistaraliði at fáa stig úr burturúr dystum, har mótstøðan er stór.

Stóra úrslitið, sum lagt varð upp til í hesum dystinum útibleiv, og tí hevur ÍF enn ikki vunnið nakrað dyst ímóti teimum 4 ovastu liðunum í deildini. Við tí ágrýtni og orku, sum ÍF-leikararnar vísa ferð eftir ferð, so varður tað ikki leingi, áðrenn teir vinna ein dyst ímóti einum topp-4 liði.

Dysturin ímillum ÍF og HB varð partur av Varmakeldu-skránni, og aftaná dystin handaði borgarstjórin í Fuglafjarðar Kommunu steyp til vinnandi liðið úr Havn.

# BMT

## Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast






MOWI

FAROE ISLANDS

# RINKA

FINEST SALMON

CRAFTED BY **NATURE**





**FULLKOMILEIKIN HEVUR EITT NAVN.** Hon eitur Rinka. Hon er sterk. Sjáldsama vøkur. Rinka veksur seg til í Føroyum og verður myndað av brimi og kyrru. Tað er hetta, sum ger hana til heimsins besta laks. Handfarin við nærlagni. Handfarin av náttúruni.

Hetta er Rinka. Laksur úr Føroyum frá Mowi.

RINKA.FO

# „Vit eru ÍF-fan“

## SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**

**TAKKAR FYRI STUÐULIN**